# Foreldur at deyvum børnum rópa neyðarróp



*– Tá ið umstøðurnar eru so vánaligar í Føroyum, fær tað okkum at seta spurnartekin við, um føroyska samfelagið yvirhøvur rúmar okkara deyvu børn, sigur Virgar Hvidbro, skrivari í felagnum Hoyrnini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**– Vit vilja tosa við okkara børn á teirra máli, og tað kunnu vit ikki, um vit ikki sleppa at læra teknmál. Tað nyttar ikki, at vit fyrst um fimm ár kunnu læra málið hjá okkara børnum. Vit hava brúk fyri eini loysn her og nú, sigur Virgar Hvidbro, skrivari í felagnum Hoyrnini**

DEYVAVIÐURSKIFTI
*Turið Kjølbro*

Tað er ikki lætt at vera deyvur í Føroyum. Fyri at vinna teim deyvu rættindi, sum eru sjálvsøgd aðra staðni, mugu avvarðandi at deyvum, foreldur og onnur, stríðast av øllum alvi alla tíðina.

– Vit eru noydd at berjast fyri hvørjum einasta feti, sum verður tikið til frama fyri tey deyvu. Tað er sera møtimikið og strævið, sigur Virgar Hvidbro, skrivari í felagnum Hoyrnini.

Nú rópar felagið Hoyrnin aftur varskó. Í kjalarvørrinum av, at teknmálsráðgevin kendi seg noydda at siga seg úr starvi á Sernámsdeplinum, eru øll skeið og øll ráðgeving farin fyri bakka. Foreldur og avvarðandi at deyvum hava tískil ikki havt møguleika at fara á skeið, sum ger tey før fyri at tosa við síni børn.

– Vit vilja tosa við okkara børn á teirra máli, og tað kunnu vit ikki, um vit ikki sleppa at læra teknmál. Tað nyttar ikki, at vit fyrst um fimm ár kunnu læra málið hjá okkara børnum. Vit hava brúk fyri eini loysn her og nú, sigur Virgar Hvidbro.

### Vanlukkuligt

Hetta árið sum er við at verða runnið, hevur verið serliga turbolent hjá teim deyvu og teirra avvarðandi. Nýggir deyvir næmingar sluppu við bit og slit í skúla í summar, men umstøðurnar har eru ikki nøktandi. Og vegna ov stóra arbeiðsbyrðu segði einasti teknmálsráðgevin í Føroyum upp í summar. Í staðin fyri at gera arbeiðsumstøðurnar hjá viðkomandi nøktandi, er starvið niðurlagt.

– Tað er einki minni enn ein vanlukka, at deyvaráðgevin kendi seg noydda at siga seg úr starvi. Øll, sum hava bara eitt lítið sindur við deyvaøkið at gera, kenna tað stóra og týdningarmikla arbeiðið, hon hevur gjørt.

Starvið hjá teknmálsráðgevanum var sett til hálva tíð, men arbeiðsbyrðan svaraði til tvey størv fulla tíð.

– Ein ráðgevi, sum leggur so stóra orku í sítt arbeiði, fær ein ótrúligan serkunnleika. Er meiningin at lata henda kunnleika fara fyri bakka, spyr felagið Hoyrnin í brævi til Sernámsdeplin.

Felagið Hoyrnin vil eisini hava at vita frá Sernámsdeplinum, hvørjar ætlanir eru fyri framman viðvíkjandi deyvaráðgeving, teknmálsskeiðum, bústaðarviðurskiftum hjá deyvum, og umstøðum hjá deyvum á skúlum kring landið. Av Sernámsdeplinum hevur Hoyrnin fingið at vita, at í komandi ári eru lítil útlit til, at teknmálskeið koma á skránna í bræði.

### Vónbrot

Eisini yvir fyri øðrum myndugleikum hevur Hoyrnin gjørt vart við ótolandi viðurskiftini hjá teim deyvu og avvarðandi teirra, í seinastuni Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini hjá Løgtinginum. Til komandi fíggjarlóg hevði felagið eina vón um, at lagt varð upp fyri bøttum viðurskiftum fyri teim deyvu. Men uppskotið til løgtingsfíggjarlóg var eitt vónbrot í so máta. Tískil hevur felagið Hoyrnin heitt inniliga á politisku myndugleikarnar um at síggja til, at tey deyvu og avvarðandi teirra fáa betri umstøður.

– Tað besta er at fáa skeið á hvørjum ári í teknmáli, eins og foreldur at deyvum fáa aðra staðni. Fáa foreldur ikki frálæru, verður samskiftið við børnini sera avmarkað, hóast øll royna eftir førimuni, sigur Virgar Hvidbro.

Aðra staðni eru umstøðurnar hjá teim deyvu og avvarðandi teirra ikki at samanbera við føroysk viðurskifti. Í Noregi fáa foreldur, sum fáa eitt deyvt barn, eina sokallaða foreldraútbúgving, ið er 40 vikur samanlagt í tíðarskeiðinum meðan barnið er í aldrinum 0-16 ár. Hetta svarar til tvær og eina hálva viku um árið. Umframt fáa foreldur onnur skeið í eitt nú deyvamentan og øðrum viðkomandi.

– Hetta gevur foreldrum høvi til at læra málið hjá barninum, so at tey kunnu samskifta á einum støði, sum er virðiligt, sigur Virgar Hvidbro.

Eitt barn, sum ikki hoyrir, er øðrvísi fyri enn onnur børn. Tískil hava foreldur at deyvum tørv á serligari ráðgeving. Einasti deyvaráðgevin í Føroyum fór sum kunnugt úr starvi í summar.

– Av tí, at hon er farin úr starvi, eru umstøðurnar hjá teim deyvu versnaðar mundandi. Uppsøgnin hjá henni var eitt neyðarróp til myndugleikarnar um at fáa betri umstøður at virka undir. Men ístaðin fyri at lurta, valdu myndugleikarnir heldur at spara pengarnar burtur. Tá ið umstøðurnar eru so vánaligar í Føroyum, fær tað okkum at seta spurnartekin við, um føroyska samfelagið yvirhøvur rúmar okkara deyvu børn, sigur Virgar Hvidbro.

## Banka uppá

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið úr bókina Banka uppá eftir Annu Claru Tidholm**

ÚTGÁVA

Banka uppá er ein stuttlig og mennandi smábarnabók í bjørtum litum til foreldur og tey smæstu at spæla og hugna sær við: Á fyrstu síðu sært tú mynd av lítla húsinum við bláu hurðini. So skalt tú banka uppá og vita, hvør er inni. Tú blaðar, og har situr lítli Melli og vaskar dunnu og slær á trummu. So fert tú út aftur og bankar á reyðu hurðina, grønu, gulu o.s.fr. Banka uppá er komin út í flest øllum londum á okkara leiðum, og høvundurin Anna-Clara Tidholm hevur vunnið nógvar virðislønir, bæði fyri hesa og aðrar bøkur av sama slagi. Niels Jákup Thomsen týddi bókina úr svenskum.

Banka uppá er 28 bls. í litum, innbundin. Bókin kostar kr. 49 í bókabúðunum. Spf. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

## Frímerki heimsins vanligasta frítíðarítriv




SNIRR&STROK
*Turið Kjølbro*

Í Snirri & Stroki, sum júst er komið, stendur mangt og hvat forvitnisligt at lesa. Væl verður gjørt burtur úr frímerkjasavnan. At savna frímerki er heimsins vanligasta frítíðarítriv. Ein av frágreiðingunum um, hví frímerkjasavnan er so væl umtókt, er, tí at hvørt frímerki hevur eina søgu afturat sær. Fyrsta føroyska frímerkið var bara hálvt, stendur at lesa í Stroki.

Tá ið menn grótu um einki, er heitið á týddari grein. Nú á døgum er næstan bannað at gráta, men fyri nøkrum fáum 100 árum síðani, skuldi tú gráta ofta og leingi. Gjørdi tú ikki tað, vart tú ikki ein rættur maður.

Hópin av smærri greinum og greinastubbum er í blaðnum, umframt nógv tilfar um tey kendu. Kappingar eru eisini, krossorðagáta, børnini skriva og tekna, søgur frá børnum, og aðrir fastir tættir.



# Ikki við í útvarpsarbeiði

**-Tá ein útvarpsmaður nýtir sín demokratiska rætt til at stilla upp til eitthvørt val, so verður hesin ikki nýttur til útvarpsarbeiði, sigur Jógvan Jespersen. Eisini í SVF sleppa valevni ikki framat á skíggjanum sum annað enn valevni, men í øðrum sambondum verður mett um í hvørjum einstakum føri, sigur Mikkjal Helmsdal**



*Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri hevur greiðar reglar fyri, hvat hansara starvsfólk kunna í sambandi við politisk val.*

FÓLKATINGSVAL
*Heri á Rógvi*

Upp undir val spæla fjølmiðlarnir ein rættiliga stóran leiklut. Almennu fjølmiðlarnir, t.e. Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya eru umfataði í lógini um kringvarp, sum ásetir hvat SVF, Útvarp Føroya eins og aðrar útvarpsrásir kunnu ella ikki kunnu gera viðvíkjandi sínari senditíð og sendingum. Lógin um kringvarp ástur útvarpsrásum ikki at gera lýsingararbeiði við politiskum ella átrúnaðarligum áhugamálum. Almennu miðlarnir fáa ávíkavíst útvarps- og sjónvarpsgjald, sum eisini ávirkar treytirnar fyri virksemið hjá teimum.

At føroyska samfelagið er rættiliga lítið mugu allir fjølmiðlar sanna viðhvørt, og hetta merkir millum annað, at fólk, sum møguleiki hevur verið at sett sín kross við til okkurt val, trína fram á skíggjanum ella hoyrast í útvarpi.

Bæði Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya hava ásetingar viðvíkjandi at starvsfólk á stovnunum stilla upp til politisk val.

Jógvan Jespersen, stjóri fyri Útvarp Føroya, sigur, at teir hava greiðan politikk á økinum.

-Um eitt starvsfólk í Útvarpi Føroya velur at stilla upp til eitt politiskt val, fær hetta tær fylgjur, at starvsfólkið ikki luttekur í vanligum útvarpsarbeiði, t.e. tað kemur ikki framat mikrofonini og verður heldur ikki nevnt í sendingum, sigur Jógvan Jespersen. Starvsfólk í Útvarpi Føroya, ið velja at stilla upp, kunna luttaka í sendingum hjá sínum flokkum, sum hesir fáa ásett, eins og í valsendingum annars.

Til hetta fólkatingsvalið er Jógvan Arge, programmleiðari í Útvarpi Føroya, uppstillaður, og hann hevur eisini verið framat í valsendingini hjá sínum flokki. Til hetta sigur Jógvan Jespersen, at tað er demokratiski rætturin hjá einum og hvørjum at stilla upp eitt val, og hetta kann mann gera sær sínar tankar um, men so leingi valstríðið heldur á, so vil Jógvan Jespersen ikki siga nakað meira um hetta er óheppið ella ikki.

Stjórin fyri Sjónvarp Føroya, Mikkjal Helmsdal, sigur, at teir í hesum sambandi hava ta siðvenju, at eru starvsfólk uppstillaði, so koma tey ikki á skíggjan í øðrum enn teimum sendingum, har tey luttaka sum valevni. Hann sigur tó, at tað í hvørjum einstøkum føri verður mett um, hvørt tað er rætt at nevna ella hava eitthvørt valevni við í einari sending.

Sjónvarp Føroya hevur fleiri starvsfólk, sum annað hvørt hava verið ella eru politisk aktiv, og hetta kemur í síðsta enda til, um mann kann líta á professjonellalismuna hjá starvsfólkunum, sigur Mikkjal Helmsdal.

Einki starvsfólk í Sjónvarpi Føroya er uppstillað til fólkatingsvalið 20. november.

# 20 grundstykkir í Gundadali

ÚTSTYKKING
*Ingrid Bjarnastein*

Í Gundadali verður í løtuni stykkjað út til nøkur grundstykkir.

Ikki hevur tað eydnast okkum, at fáa nakrar viðmerkingar um útstykkingina av tí, at útstykkingin er privat. Tó siga tey á teknisku deild á býráðnum, at talan er um eini 20 grundstykkir.



*Grundstykkir verða í løtuni stykkjað út í Gundadali*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

